VIÐMERKINGAR

# Málið fór í respirator og samgongan við

**Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskona**



Harragud fólk hava verið tolin og góð at fáast við, undir hesi »tilgongdini«, sum ongantíð bleiv nøkur gongd, enn minni gonga. Minnir ikki sørt um, tá hesi fittu børnini plagdu at syngja í Barnaútvarpinum: »Her eru vit, hvar eru tit«? Tí, hvar hava teir verið, okkara valdsharrar í Nesinum? Hvat hava tey fatlast við?

## Hóttafall

Fullveldismálið er sjúkt. So sjúkt, at alt fleiri standa sum ryssa yvir deyðum fyli og skoða hetta »missing linkið«- skilja ikki petti av øllum jánkasligu royndunum, ferð eftir ferð at blása nýtt lív í næsarnar á hesum eftirhondini trænaða?? og vitaminfátæka skapningi.

»Blásið nú, hinir gomlu«, hevur ljóðað frá Vara úr Nesinum í samfull 3 ár. Og tey hava blást, Helena og Anfinn bæði, stundum í annan endan, stundum í hin, og ansað eftir at hava sjúklingin liggjandi í læstari liðlegu, at tryggja fríar luftrásir soleiðis javnan. Lívsblásturin og heilivágurin hevur verið upplýsing og aftur upplýsing, sum skuldi takast so ofta, sum høvið beyðst, fyriskrivað av »Vara«. Helst dagliga, hevði borið til at sett hátalarar upp á hvørjum geilarhorni við fyrimynd frá lítla runda manninum úr Kina á sinni.

## Doping

Fólk hava verið mødd og dopað við eini yvirakademiskari ikki fólksligari upplýsing. Dýr hevur hon verið- so svínadýr, fíggjað við »betroede midler« hjá fólkinum. Bæði teimum, sum vildu fullveldi og ikki. Fínir farvuladufaldarar hava ligið og rikist millum reklamubløð frá »Sengelarsen« um boxmadrassur og undirløg, tí valdsharrarnir komu eftir, at ikki øll høvdu teldur og internet. Tí mátti boðskapurin sendast út í øll hús, so ikki bara elitan fekk »dyggað« um sína egnu dygdargóðsku. Ein boðskapur, við bæði spurningum, svari og hópin av juristaríi. Nógv juristarí, men vakur tanki! Alt virkaði so smart. So nýtt, sum um lívið nústaðni byrjaði. Gud viti hvat fólk mundu halda seg hava gjørt frammanundan? Fjant og fjas, mundu summi halda. Men nú skuldi fólkið reisa seg stolt, íbundið reim og seðlum! »Loysing« broyttist til »skipað loysing« til »fullveldi« til »fullveldistilgongd« til »sjálvsstýristilgongd« til »tilgongd«- you name it! Alt hetta er í dag kókað saman til ullarlagdin »málið«. Man var samdur um málið, uttan tó at nakar teirra í dag er førur fyri at greiða frá, hvat tað er.

80 ára gomul einsamøll ábyrgd av javngomlum sinilum og hjálparsleysum makum.

## Her eru vit, hvar eru tit?

Harragud fólk hava verið tolin og góð at fáast við, undir hesi »tilgongdini«, sum ongantíð bleiv nøkur gongd, enn minni gonga. Minnir ikki sørt um, tá hesi fittu børnini plagdu at syngja í Barnaútvarpinum: »Her eru vit, hvar eru tit«? Tí, hvar hava teir verið, okkara valdsharrar í Nesinum? Hvat hava tey fatlast við? Hvussu skulu fólk skilja alla gremjanina um blokkin, sum hann eftirhondini meira vulgert verður róptur. Gremjanina, serliga frá tjóðveldsku politisku entreprenørunum og oraklunum, um somu tíð, sum 80 ára gomul einsamøll hava ábyrgd av javngomlum sinilum og hjálparsleysum makum, sum treingja til 100% ansing og røkt allan sólarringin? Ella tey, sum verða skrivað út av sjúkrahúsinum í einsemi uttan hjálp av nøkrum slag? Ella einsamallir tímaløntir uppihaldarar, sum ikki hava ráð at fylla sær oljutangan? Hvussu kunnu øll hesi skilja og virða sjónarmið, sum siga, at blokkurin er av tí ónda, um somu tíð, sum eingin av teim ráðandi vil av við hann ella lata oyra úr kassanum at bøta um teirra kor? At vit hava ov nógv og tó ov lítið? Kreppan ella 80`ini? Tað keypir eingin longur! Kreppuna hava hesir dyrkað sum undanførðslu fyri einki at gera nóg leingi. Hví er alt so trupult júst nú?

## Valdið á undirgrundini eisini ein trupulleiki?

Sjálvt tað, at vit hava bæði lóggávu- og umsitingarvald yvir ráðevnunum í undirgrundini, er nú ein trupulleiki! Sum um tað var betri, at so var ikki. Trupulleikar dala niður av himli. Trupulleikar, sum fólk flest bólka í luksusklassan.

Dialogurin millum fólkið og teir ráðandi hevur hesi 3 árini verið so mikið ping pong kent, at ásannast má, at tey hava ikki tosað sama mál.

## Automatiseraður blástur

Heldur enn sjálvi at blása nýtt lív í »málið« nú, frættu vit í SVF fríggjakvøldið, at bæði tað og entreprenørarnir sjálvir eru lagdir í respirator. Um tey sjálvi hava fingið í so nógv av hesum heilivági, soleiðis at hann er vorðin teimum tað ramasta drøgg, er ilt at siga. Vanlig fyrstahjálp man muna lítið til nakað, sum er so ússaligt og illa farið. Tað er vist.

## Nú er nokk!

Tó eru tað tey ótroyttiligu sum halda, at nú er nokk! Nú er nóg mikið slakað! Av sínum eintingum taka tey til vápnini, sum í hesum landinum tíbetur bara er orðið, at blása nýtt lív, við tí úrslitið, at Vara slakaði bara. Tað eru tey, sum av øllum alvi alment royna at krossfesta. Jú grovari, jú betri. Ikki eru tað tey ungu, sum enn ikki hava runnið hornini av sær. Tey, sum eru ímyndin av protest. Nei, hetta eru tey væletableraðu. Ein teirra plagdi at smyrja ketsjup í eitt hjørn. Nú smyr hann alment runu á landsins hægstu tign- áður tænti hann hesum sama. Ella mentaðar røddir, sum til dømis CHEbjørn og Jensen. Oratoriskir torubjølgar eru góðir til at taka, men lat meg nú ikki fara sama veg. Ella, sum klaksvíkskonan segði á sinni, tá prestastríðið leikaði í, og fundamentalistisku hógvarnir stóðu beint upp í rógv-tá óttaðist hon fyri, at fólk vórðu prædikaði út úr kirkjuni. Skal hetta vera lagið og stílurin at vera samd ella ósamd, fara fólk ikki at torga at hoyra um sjálvstýri av nøkrum slag.

Evnini til, í øðrum lagi at hava orkað allar hesar akademisku háfloygdu útgreiningarnar, sum fakfólkið sínámillum eru ósamd um, og so tað primitiva, tá fremstu mentafólk fer upp at rópa og eggja til vápnað stríð fyri sakina, man vera at finna í ovurhonds stórum humoristiskum sansi hjá fólki flest. Tí onkursstaðni har ímillum munnu tey flestu vera.

# Neyðtiknar av løgreglumonnum, sum sluppu snikkaleysir

Tveir løgreglumenn úr Manilla handtóku seint um kvøldið eina 18 ára gamla gentu, sum var undir illgruna fyri at flakka. Í staðin fyri at taka hana á løgreglustøðina, noyddu teir hana inn í ein jeep, sum stóð nærhendis støðini, og saman við einum triðja manni neyðtóku teir hana. Teir vórðu uppdagaðir av bilánaranum, sum eisini var løgreglumaður.

Ein 17 ára gomul genta, sum sat í fongsli, ákærdi fangavørðin og 11 vaktarmenn fyri at hava neyðtikið hana og hótt hana við byrsum. Royndir hennara at klaga vóru afturvístar, til hon varð innløgd til viðgerðar, tí hon var smittað við kynssjúku.

Ein 24 ára gomul kvinna í Manilla varð handtikin av trimum narkotikaløgreglumonnum. Hon varð leyslatin uttan ákæru, aftaná at teir høvdu noytt hana at verða við til oralsex í einum løgreglubili og hava hótt hana og rænt frá henni eina stóra peningaupphædd, sum teir høvdu tvungið hana til at taka út úr einum banka. Løgreglumennirnir, sum fingu ávíst nýtt arbeiði aftaná tilburðin, vóru framvegis leysir fleiri vikur seinni, tó at teir vóru ákærdir fyri neyðtøku og rán.

Hesar ræðandi søgurnar um neyðtøku og kynsmisnýtslu, framdar av stjórnarinnar umboðsmonnum, eru bert nakrar fáar av teimum, sum filippinsku fjølmiðlarnir hava sagt frá. Í juni mánaða í 2000 staðfesti ein fyrrverandi filippinskur senatorur, at 12 løgreglumenn vóru ákærdir fyri neyðtøku seinastu 10 mánaðarnar. Vegna manglandi systematiskt eftirlit, er trupult at meta um, hvusu víttfevnandi trupulleikin er, men kvinnuligir sakførarar og felagsskapir, sum arbeiða við kvinnurættindum í Filippinunum eru samd um, at tað er ógvuliga átroðkandi at virka fyri, at kvinnur, sum sita í fongslum, verða vardar móti misbrotum.

Sagt er eisini frá kvinnum, sum hava verið fyri aðrari píning og ringari viðferð, meðan tær hava sitið inni. Talan er um hóttanir, sløg, stoytir og sparkan. Tær, sum eru í størsta vanda fyri at verða misnýttar, eru tær, sum eru ringast fyri í samfelagnum: prostitueraðar, gøtubørn (sum ofta eru rýmd heimanífrá fyri at sleppa undan harðskapi og misbrotum í familjuni), evnismisnýtarar og tær fátøku. Í mongum førum nýtir løgreglan lógina ímòti flakkan - ein lóg sum serliga diskriminerar tey fátøku og heimleysu - fyri at fremja kynsmisbrot móti kvinnum og noyða pengar frá teimum.

Um ein kvinna er kynsliga misnýtt av einum løgreglumanni, ella tað veri seg einum hvørjum manni, sum hevur vald, er tað henni ómetaliga trupult at koma við eini ákæru móti teimum. Vandin fyri hevnd forðar mongum kvinnum í at melda, og tað er staðfest, at offur hava verið noydd til at taka ákæruna aftur. Mong fólk í Filippinunum eru óttafull, tí tey vita, at løgreglan er uppií kriminellum virksemi, muturi og píning av ákærdum, kanska tí at løgreglumenn ikki vænta, at ákærur móti teimum verða tiknar í álvara.

Tað tekur ofta fleiri ár, áðrenn mál, sum fara fyri rættin, verða liðug, og dómarar taka ofta mál aftur, lutvíst tí at offurið verður hildin at vera prostituerað. í 1999 stóð at lesa í eini leiðandi ávís, at ein dómari hevði víst aftur eini ákæru móti einum løgreglumanni, sum varð ákærdur fyri at hava neyðtikið eina 13 ára gamla gentu, sum sat inni fyri stuldur. Í úrskurðinum kallaði dómarin gentuna: »Eina kvinnu í einum barnakroppi. Í hesum føri er hon nógv eldri enn svarandi til aldurin. Hon hevur jú viðgingið, at hon ikki er jomfrú, og man allarhelst sjálv hava funnið uppá hesa eggjandi søguna um girnd og neyðtøku.«

Í 1997 vórðu tríggir løgreglumenn dømdir til deyðis fyri at hava neytikið ein kvinnu, sum var við barn, og sagt er frá fleiri øðrum, sum bíða eftir at verða dømdir. Kortini hava deyðarevsing og avrættingar havt lítla og onga ávirkan á útbreiðsluna av neyðtøkum, sum eru framdar av løgreglumonnum. Fleiri kvinnufelagsskapir í Filippinunum halda, at nýtslan av deyðarevsing – sum í sjálvum sær er brot á grundleggjandi mannarættindini – heldur forðar enn fremur rættvísari rættarsókn.

Skrivað til myndugleikarnar í Filipinunum:
Secretary of Interior and Local Government
Department of the Interior and Local Government
EDSA cnr. MapagmahalSt,
Barangay, Pinyahan
Diliman 1100, Quezon City
Philippine
ella, Director General
Philippine National Police
National Headquarters
Camp Crame
EDSA, cor. Santolan Road
Quezon City, Philippines

Brævadømi:
Dear sir,
I am writing to express concern at reports that women have been subjected to rape and sexual violence in custody.

I urge you to send a clear and public message to the police and all other law enforcement officials that rape and sexual violence in custody is always an act of torture or ill-treatment, and that those carrying out such offences will be brought to justice.

I ask you to ensure that female security personnel are present during the interrogation of women, and that all male staff who supervise women are accompanied by female staff.

# ítróttur

Nr. 47 • hósdagur • 08. mars 2001 • 75 árgangur • www.sosialurin.fo

# Grand–Prix í badminton

Leygardagin 3. mars leiktu yngru leikararnir seinastu umfarið í Grand-Prix kappingini hetta kappingarárið. Leikt varð í einmansleiki í høllini í Vestmanna.

Hetta var seinasta av teimum seks Grand-Prix kappingunum í vetur, og sostatt ber nú til at gera endaligu støðuna í kappingin upp.

Niðanfyri verða nøvnini á trimum teimum fremstu leikarunum í hvørjum bólki prentað.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Gentur 11 ár | | | |
| 1 | Brynhild Carlsson | HBF | 1500 |
| 2 | Konni Kass Jacobsen | HBF | 1350 |
| 3 | Hanna Elisa Óladóttir Arge | HBF | 1255 |
| Dreingir 11 ár | | | |
| 1 | Jan Ellingsgaard | ÍF | 1415 |
| 2 | Fríði Lamhauge | HBF | 1390 |
| 3 | Heri Nesá | ÍF | 1260 |
| Gentur 13 ár | | | |
| 1 | Ulla í Dávastovu | VÍF | 1470 |
| 2 | Rannvá á Rógvu | VÍF | 1365 |
| 3 | Christina Eriksen | VÍF | 1295 |
| Dreingir 13 ár | | | |
| 1 | Niclas Eysturoy | HBF | 1500 |
| 2 | Hilmar Kass Jacobsen | HBF | 1350 |
| 3 | Reidar Luid | HBF | 1255 |
| Gentur 15 ár | | | |
| 1 | Tanja Lið Johansen | MBF | 1380 |
| 2 | Anna Kathrina Óladóttir Arge | HBF | 1370 |
| 3 | Elisabeth Petersen | VÍF | 1215 |
| Dreingir 15 ár | | | |
| 1 | Thomas Rubeksen | HBF | 1500 |
| 2 | Gunnar Poulsen | HBF | 1365 |
| 3 | Jákup á Lakjuni | ÍF | 1245 |
| Kvinnuunglingar | | | |
| 1 | Ida Holm Berner | HBF | 1390 |
| 2 | Guðrun Poulsen | VÍF | 1330 |
| 3 | Sára Óladóttir Arge | HBF | 1160 |
| Mansunglingar | | | |
| 1 | Ragnar Isaksen | VÍF | 1405 |
| 2 | Dánial Pauli Joensen | ÍF | 1187 |
| 3 | Steingar Jacobsen | ÍF | 995 |



*Gentir 11 ár*



*Dreingir 11 ár*



*Kvinnuunglingar*



*Gentir 13 ár*



*Mansunglingar*



*Dreingir 13 ár*